# Várkonsert hjá Symfoniorkestrinum



**Føroya Symfoniorkestur várkonsert sunnudagin 17. mars klokkan 1600 í Norðurlandahúsinum. Solistur verður Kristina Andersen, fagottistur.**

KONSERT
*Føroya Symfoniorkestur*

Henda konsertin hjá FSO verður eitt sindur øðrvísi enn tær undanfarnu, við tað at hesa ferð vera tað bert strúkararnir, sum manna orkestrið. Á skránni vera verk úr ymsum tíðarskeiðum, frá barokk til seinromantikk. Konsertin byrjar við einari Conserto Grosso av mæta tónasmiðinum Georg Friederich Haendel (1685–1759); hann sum flestu kenna sum skaparan av stórverkinum “Messias”. Hann var sonur ein sárlækna í Hamburg, men fór sum ungur til London og var alt sítt virkna lív í Bretlandi. Nevnda Conserto Grosso er eitt rættiliga lívligt verk við kvikligum satsum endandi við eini menuett. Verkið er sum nevnt fyri strúkarar við cembalo.

Annað verkið er fagottkonsert av Antonio Vivaldi (1678–1743). Vivaldi var italiumaður, var prestur, hevði eyknavnið il preto rosso – reyðhærdi presturin – sonur ein bakara, sum samstundis var dugnaligur violinspælari, og hjá pápanum lærdi hann violinspæl. Vivaldi er ein av ídnastu tónasetarunum, verðin hevur kent. Hann verður mettur sum faðirin at modernaðu violintøknini og hevur skrivað ikki færri enn einar 3-400 violinkonsertir, umframt ørgrynnu av ensmble-verkum, vokalverkum og soloverkum fyri onnur ljóðføri. Kendasta verk hansara millum manna er helst cyklusin “Árstíðirnar”. Solistur við fagottkonsertina av Vivaldi verður Kristina Andersen. Kristina Andersen er útbúgvin fagottistur frá Odense Konservatorium, og hevur hon eftir lokna útbúgving starvast í Odense Symfoniorkestri og Sønderjylland Symfoniorkestri. Hon hevur verið solistur í Webers fagottkonsert saman við Odense Symfoniorkestri; men eisini hevur hon verið sera virkin sum kamarmusikkari. Fyri mánaða síðani luttók hon í kappingini hjá Danmarks Radio fyri “kammerensembler”, og kom hennara trio við í runduna millum 10 tey bestu, og fingu tær eina sera góða plasering. Kristina Andersen virkar í løtuni sum musikklærari her í Føroyum.

Eftir steðgin flyta vit eini 200 ár fram í tíðina. Vit fara at hoyra eitt av kendastu verkum Edward Greigs, “Fra Holbergs Tid, Suite i gammel Stil for Strygeorkester, Op. 40,” sum upprunaligi tittulin er. Verkið er, vit kunnu næstan siga, ein rokokopastisja, gjørd 1885 til 200 áradagin fyri føðing Ludvig Holbergs, tá stórt minningarhald varð hildið í Bergen, og tá eisini ein standmynd av kenda rithøvundanum varð reist har. Edward Grieg (1843–1907) var eisini bergensari, sonur ein skota, sum hevði sett seg niður í Bergen sum handilsmaður. Eins og flestu tónasetarar, so vísti Edward Grieg tíðliga ríkar gávur, serliga sum pianistur. Hann las í Leipzig, har hann skjótt gjørdist kendur bæði sum dirigentur og pianistur. “Holbergsuitan”, sum hon vanliga verður nevnd, hevur 5 satsir: præludium, sarabanda, gavotta, air og rigaudon, alt nøvn, sum vórðu nýtt í barokktónleikinum. Men Grieg hevur brúkt norskan fólkatónleik sum undirlag, og sjónliga merkist norski spælimanstónleikurin aftur í verkinum m. a. við teim tómu kvintunum. Skemtandi kallaði Grieg verkið “et parykstykke.”

Vit halda fram í 1800talinum, men flyta okkum eini fimmti ár longur aftur.Vit fara at hoyra eina strúkarasymfoni av Felix Mendelsohn (1809–1847). Vit eru í háromantiska tíðarskeiðinum. Mendelsohn var føddur í einum patriciaraheimi í Berlin, og tá pápin ansaði, hvussu gávuríkur sonurin var innan tónleikin, forerdi hann honum eitt fult orkestur, har drongurin kundi framføra sín egna og annara tónleik. Mendelsohn var millum annað tann, sum fann framaftur tónleikin hjá Johann Sebastian Bach, sum tá á døgum var púra farin í gloymibókina. Strúkararnir í FSO fara at framføra symfoni í c-moll “Die Schweizersymfonie”, eitt av ungdómverkum Mendelsohns. Symfoniin er í 4 satsum, og sum allur tónleikur Mendelsohns, so er hann sera “melodiøsur”, hugfangandi, livandi, fróur og vælljóðandi.

Dirigentur verður Martin Mouritsen.




# Bilar

Nr. 46 • hósdagur • 7. mars 2002 • 76. árg.

# Nýtt frá Nissan – King Cab og Primera



*Trý rund instrumentir í miðjuni á instrumentborðinum. Konsollin í miðjuni er designað sum eitt telduknappaborð. Primera hevur eitt kamera á instrumentborðinum at bakka við, eins og vit kenna tað frá lastbilum og bussum*



*Her er Páll Danielsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, við nýggja Nissan King Cab við 133 hk turbodiesel motori, ið er tann størsti í sínum klassa*



*Nýggi Nissan Primera, ið er kosin ársins bilur í miðalklassanum, av motorjournalistum í Onglandi, er nú komin til landið.*

## Nissan King Cab Navara 2.5 Di 4x4

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.5 litur turbodiesel 133 hk |
| 0-100 km/t | 13,3 sek |
| Oljunýtsla | 11,0 km/l |
| Dekkstødd | 255/70-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 504,5 cm |
| Breidd | 182,5 cm |
| Hædd | 170,0 cm |
| Eginvekt | 1700 kg |
| Totalvekt | 2850 kg |
| Lastar | 1150 kg |
| Prísur | kr. 245.000,- við MVG |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v.Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 316161<br>www.nissan.fo |

**Á bilasøluni hjá Meinhardt Arge verður opið hús nú leygardagin, har ein nýggj útgáva av Nissan King Cab við størri motori, og ein heilt nýggjur Primera verða sýndir fram. King Cab við 133 hk turbodiesel motori telist millum teir kvikastu í sínum klassa, og Nissan Primera bleiv kosin ársins bilur av TopGear í Onglandi.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nissan King Cab er komin í eini nýggjari útgávu. Størstu broytingarnar uttan eru at hann t.d. hevur fingið nýggjar forlyktir, kølaragittar, tokulyktir framman, 16" aluminiumsfelgur (bert Navara) og nýggjar kúfangarar framman og aftan. Av útgerð kunnu vit eisini nevna fjarstýrt sentrallás, el-síðurútar, el-síðuspegl við varma, automatiskt klimaanlegg.

### Størri motor

Ein onnur broyting er eisini tann at King Cab nú hevur fingið nýggjan og størri motor. Motorurin er ein 2.5 litur turbodiesel við beinleiðis innspræning og 133 hk, og er tann størsti í sínum klassa. Í mun til forgangaran, ið hevði 104 hk, er hetta ein stór broyting. King Cab fæst eisini sum pickup við 4x2, og við dupultari kabinu sum 4x4.

### Nissan Primera

Nýggi Nissan primera er ein smartur bilur, sum kemur at gera um seg millum kappingarneytarnar. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform og er nakað størri enn forgangarin. Sum nakað heilt nýtt eru instrumentini í miðjuni á instrumentborðinum og allar funktiónirnar eru í eini konsoll í miðjuni. Hann hevur t.d. kamera á instrumentborðinum at bakka við, eins og vit kenna tað frá lastbilum og bussum.

### Eisini sum diesel

Primera fæst í útgávunum: Visio, Acenta og Tekna. Tríggir bensinmotorar eru at velja ímillum: 1.6 litur 16V / 109 hk, 1.8 litur 16V / 116 hk og 2.0 litur 16V / 140 hk og ein 2.2 litur CDi commonrail dieselmotorur við 126 hk. Sum tann einast í sínum klassa kann Primera leverast við fartpiloti, sum altíð heldur røttu frástøðuna til bilin sum koyrir frammanfyri.

### Opið hús leygardagin

Við nýggja Primera hava konstruktørarnir hjá Nissan gjørt alt fyri at sameina sportligar og komfortablar koyrieginleikar í einum elegantum bili. Leygardagin tann 9. mars verður opið hús hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin frá kl.10-15, har høvið verður at síggja og royna nýggju Nissan bilarnar.